# Róðrarsamband Føroya

**Lóg um kappingarreglur hjá Róðrarsambandi Føroya**

**Seinast broytt við aðalfundarsamtykt frá 18. mars 2023**

## Kapittul 1
## Kappróðrarøkið

**§ 1.** Kappróðrarfelag, sum skipar fyri stevnu, hevur skyldu til at ávísa øki til kappróðarabátar at standa á.

**§ 2.** Dráttur skal vera minst 6 alin og 8 tm breiður (4 metrar), soleiðis at bátarnir trygt kunnu dragast, uttan at vandi skal vera fyri fólki ella bátum.

**§ 3.** Stevnudagin hevur felag, sum skipar fyri stevnu skyldu til at syrgja fyri:

1. at ábyrgdarfólk er til staðar til leiðbeining fyri umboðum fyri RSF,
2. at ábyrgdarfólk tekur í móti og skipar fyri,
3. at allir bátar verða settir á rætt pláss og bólkaðir,
4. at dráttur er í lagi,
5. at hóskandi høli er tøkt á máløkinum til máldómarar, sjónvarpsupptøku, útvarp o.a.,
6. at bátar koma avstað rættstundis og í rættari raðfylgju til kappróðurin, og
7. at viðurskifti annars, sum ikki beinleiðis hoyra undir RSF, eru í lagi.

**§ 4.** Um tey í §§ 1- 3 nevndu viðurskifti ikki eru í lagi í minsta lagi 4 tímar áðrenn kappróðurin byrjar, kunnu høvuðsdómararnir avlýsa róðurin.

**§ 5.** Umhvørvisstovan ella góðkendur landmátari skal hava uppmált kappróðararøkið og sett tvey matrikkulnummur á málinum, 500 m og 1000 m. Somuleiðis skulu tvey matrikkulmerkir vera á miðjuni á kappróðararøkinum, har hetta landafrøðiliga er gjørligt.

**§ 6.** Kappróðararøkið skal vera soleiðis, at startlinja og mállinja eru vinkulrættar róðrarteinin.

**§ 7.** Á startmálinum og á dómaramálinum skulu tvær lætt sjónligar stengur (hvítar og reyðar) standa á landi sum ýti fyri róðursmenn og startdómarar.
*Stk. 2.* Tvær boyur skulu merkja av breiddina á róðrarøkinum. Hesar boyur skulu í seinasta lagi 4 tímar undan róðrinum leggjast út á 500 og 1000 metra málinum. Frástøðan millum hesar boyur skal vera so stór, at hvør bátur í minsta lagi hevur 11.5 metra róðrarøki.
*Stk. 3.* Inni á málinum skulu lætt sjónligar boyur liggja ella stengur standa sum stavnhald, 11. 5 metrar millum hvørja boyu ella stong.
*Stk. 4.* Innan fyri málið skulu vera sjónlig frámerki, ið vísa breiddina og miðjuna á róðrarøkinum.
*Stk. 5.* Um skaði kemur á startin, er tað felagið, sum skipar fyri stevnu, sum skal rinda skaðan.
*Stk. 6.* Um róðrarøkið er ov trongt, ella aðrar orsøkir tala fyri tí, verður býtt upp í bólkar.

## Kapittul 2
## Staðseting av bátum og stig

**§ 8.** RSF upplýsir stevnufyrireikaranum og dómarum startnummarrøðina í seinasta lagi dagin fyri kappróðurin. Er hetta fyrsta stevna í árinum verður býtt við lutakasti.

**§ 9.** Báturin, sum vann á síðstu stevnu, liggur í mittasta róðrargeira. Hinir bátarnir liggja út frá mittasta róðrargeira soleiðis, at nr. 2, 4, 6 o.s.fr. liggja høgrumegin, og nr. 3, 5, 7 o.s.fr. liggja vinstrumegin. Meldar bátur frá til næstu stevnu broytist raðfylgjan soleiðis, at bátarnir, sum koma á mál eftir frámeldaða bátin, flyta eina plasering fram á startlistanum til næstu stevnu. Enda bátar javnir á seinni stevnu, skipar RSF fyri lutakasti um, hvar bátarnir skulu liggja á næstu stevnu.
*Stk. 2.* Stevnunummar 1 er ytsta plássið høgrumegin, sæð frá startplássi móti máli.

**§ 10.** Í barnaróðri rógva gentur fyri seg og dreingir fyri seg. Til ber eisini at hava blandaða manning, tó at hon telur sum dreingjamanning í barnaróðri.

**§ 11.** Gentur og dreingir, kvinnur og menn, kunnu rógva við øllum bátastøddum. Verður róð við blandaðari manning, telur hon sum mannfólkamanning. Tó kunnu kynini stýra hvørt hjá øðrum leyst av hesu reglu.

**§ 12.** Eru fleiri luttakandi bátar, enn tað er pláss fyri á kappróðrar økinum, verður róð í riðlum. Um hetta er fyrsta stevna í árinum, verður býtt við lutakasti. Er tað harafturímóti stevna mitt í árinum, verður tað eftir støðuni frá síðstu stevnu. Í bólki nr. 1 verða bátar nr. 1, 3, 5, 7, 9, 11, 13, 15, o.s.fr. Í bólki nr. 2 verða bátar nr. 2, 4, 6, 8, 10, 12, 14, 16 o.s.fr.
*Stk.2.* 5 teir fremstu í hvørjum bólki rógva í finaluni við hesum startnumrum:
Bátur nr. 5 úr bólki nr. 2 fær startnr. 4.
Bátur nr. 4 úr bólki nr. 1 fær startnr. 5.
Bátur nr. 3 úr bólki nr. 2 fær startnr. 6.
Bátur nr. 2 úr bólki nr. 1 fær startnr. 7.
Bátur nr.1 úr bólki nr. 2 fær startnr. 8.
Bátur nr. 1 úr bólki nr. 1 fær startnr. 9.
Bátur nr. 2 úr bólki nr. 2 fær startnr. 10.
Bátur nr. 3 úr bólki nr. 1 fær startnr. 11.
Bátur nr. 4 úr bólki nr. 2 fær startnr. 12.
Bátur nr. 5 úr bólki nr. 1 fær startnr. 13.

## Kapittul 3
## Til- og frámelding

**§ 13.** Fyri at sleppa at rógva í FM kapping skal bátur verða tilmeldaður innanfyri eina freist, sum verður ásett av RSF.
*Stk. 2.* Við fráboðan um luttøku skulu bátastødd og navn upplýsast. Eisini skal sigast frá, hvør er bátsformaður á bátinum.
*Stk. 3.* Einki felag kann tilmelda bátar við sama navni ella sama høvuðsnavni, so sum Gamlibátur ella Nýggibátur. Tá tilmeldingarfreistin er úti, skal RSF skipa fyri lutakasti til startnummarrøðina á fyrstu FM-stevnu.

**§ 14.** Samstundis sum bátarnir verða tilmeldaðir, skal eisini tilmeldingargjaldið verða goldið. Tilmeldingargjaldið er kr. 300,00 fyri árið fyri hvørja manning og skal verða flutt um peningastovn. Víst verður til § 27 í lóg fyri Róðrarsamband Føroya.

**§ 15.** Í seinasta lagi 5 dagar áðrenn fyrstu stevnu (vanliga mánakvøld), skal hvørt felag senda inn gildugan luttøkuseðil til RSF. Hesin luttøkuseðil er galdandi fyri allar stevnurnar. Kemur nýggjur rógvari á onkran bát í kappingarárinum, skal hesin rógvarin tilmeldast skrivliga til RSF í seinasta lagi dagin fyri, at róð verður.
*Stk. 2.* Bátur, sum ikki hevur latið gildugan luttøkuseðil frá sær, sleppur ikki at rógva.

## Kapittul 4
## Stevnur

**§ 16.** Sambært § 17 í lóg fyri Róðrarsamband Føroya skal RSF í seinasta lagi 1 viku áðrenn aðalfundin hava fráboðan um, nær stevnurnar verða árið eftir. Sambært somu áseting sendir RSF boð til stevnufyrireikararnar samstundis,

sum innkalling til aðalfundin hjá RSF verður send, og minnir á, at í seinasta lagi 1 viku áðrenn aðalfundin skal RSF hava at vita, nær stevna teirra verður árið eftir. Um so er, at felag ikki hevur boðað frá hesum, verður stevnan dagsett á aðalfundinum.
*Stk. 2.* Í hesi fráboðan frá RSF skal tilskilast, at stevnufyrireikararnir hava skyldu til at útvega:

1. tveir skjóttgangandi høvuðsdómarabátar við førara. Ein til høvuðsdómaran á vágni og ein til høvuðsdómara 2 á vágni.
2. ein startdómarabát við førara,
3. tveir hátalarabátar við førara,
4. ein máldómara,
5. ein hjálpara hjá máldómaranum,
6. ein skjútta og
7. tveir skrivarar.

*Stk. 3.* Í brævinum verður tilskilað, at í seinasta lagi 14 dagar áðrenn fyrstu stevnu skulu stevnufyrireikararnir hava fráboðað nevndu upplýsingar, og at nevndu persónar skulu møta í seinasta lagi 2 tímar áðrenn fyrsta róður.

**§ 17.** RSF setir tveir startdómarar og eitt hjálparfólk og tveir høvuðsdómarar og eitt hjálparfólk til hvørja FM stevnu.

**§ 18.** Í góðari tíð áðrenn róður byrjar, og ikki seinni enn 2 tímar áðrenn, kannar høvuðsdómarin,

1. um streymur er á staðnum,
2. at málstengur standa, sum tær skulu,
3. at róðraðøkið er avmerkt og boyur eru lagdar út, sum tær skulu,
4. at samskiftistól eru í lagi,
5. at róparar eru í lagi,
6. at videotól og málsnórar eru uppsett og í lagi,
7. at revolvarar til start-, mál- og høvuðsdómarar eru í lagi,
8. at fólkið, sum stílar fyri, ikki eru rúsaði, og
9. at veðrið er til vildar at rógva.

**§ 19.** Umboðini hjá RSF á stevnum hava m.a. til uppgávu at hava við ta útgerð, sum er áløgd RSF at koma við. Umboðini fyri RSF møta í seinasta lagi 2 tímar áðrenn róð verður.

## Kapittul 5
## Upphiting og dráttur

**§ 20.** Upphitingarøkið skal vera avmerkt á korti, sum verður sent út til feløgini frá stevnufyrireikaranum, og eitt sjónligt kort skal vera við dráttin.

**§ 21.** Manningar, sum skulu hita upp, skulu nýta ávísta upphitingarøkið.

**§ 22.** Skiftiøkið hjá manningunum skal liggja burtur frá dráttinum, so tað ikki órógvar tær manningar, sum skulu út við bátum.

**§ 23.** Manningar, sum skulu út til start, hava fyrsta rætt framum tær manningar, sum skulu upp við bátinum eftir teirra róður.
*Stk. 2.* Bátar, sum fara út til start, halda seg til sítt stýriborð, og bátar sum skulu upp, halda seg til sítt stýriborð.

**§ 24.** Skiftingarøkið hjá manningunum skal vera avmerkt á korti, sum verður sent til feløgini frá stevnufyrireikaranum, og eitt sjónligt kort skal vera á dráttinum.

**§ 25.** Tá manning á báti verður skift, fer skiftið fram á tí økinum, sum er ávist av stevnufyrireikaranum.

**§ 26.** Drátturin skal vera so nær við málbilin sum gjørligt.

**§ 27.** Bátur skal rógva beinleiðis frá dráttinum ella skiftingarøkinum út á upphitingarøkið og harfrá beinleiðis út á startin.

**§ 28.** Bátur skal rógva beinleiðis út á start, tá flaggið hjá startdómarararnum er vundið á stong.

**§ 29.** Eftir loknan róður skal bátur rógva beinleiðis frá málinum og inn á dráttin ella á skiftingarøkið.

## Kapittul 6
## Ávaringarskipan

**§ 30.** Kort verða givin fyri brot á reglur fyri FM í kappróðri.

**§ 31.** Gult kort verður givið fyri smærri brot.

**§ 32.** Reytt kort verður givið fyri stór brot og merkir hetta, at báturin verður kolldømdur. Kolldømdur bátur skal fara av kappróðrarøkinum beinanvegin og fær einki stig tann dagin.

**§ 33.** Verða tvey gul kort givin sama dag til somu manning/bát, fær báturin reytt kort.

**§ 34.** Um trý gul kort eru givin á ymiskum kappingardøgum til somu manning/bát, fær báturin reytt kort tann dagin, triðja gula kortið verður givið.

**§ 35.** Gul kort verða givin:
1. um róðrarmanning ikki aktar boð frá start- og høvuðsdómarum,
2. um róðrarbátur tjóvstartar,
3. um róðrarbátur undir róðri fer av róðrarøki sínum og inn á økið hjá øðrum róðrarbáti,
4. um róðursmaður/kvinna reisir seg undir róðri,
5. um róðrarbátur hongur eftir, eftir at startað er, tó skulu fyrivarni verða tikin, um bátur hongur eftir av tekniskum feilum á útgerð,
6. [1] (Strikað)
7. um róðararbátur ikki er á kappróðrarøkinum ávíst av stevnufyrireikarunum, og
8. um bátur kemur ov seint til start.

**§ 36.** Reyð kort verða givin
1. um róðrarbátur við vilja ella av grovum ósketni undir róðri fer av róðrarøki sínum og inn á økið hjá øðrum róðrarbáti og órógvar kappingarneytan/ar, og
2. um róðrarbátur órógvar vegna óhapp á róðrarútgerð.

*Stk. 2.* Víst verður til reglurnar fyri døming.

**§ 37.** Høvuðsdómarin gevur ávaring til dømda bátin beinanvegin úti á róðrarøkinum.

## Kapittul 7
## Døming

**§ 38.** Gul kort givin í umróðri á Ólavsøku skyldaður av, at bátar eru komnir javnt á mál, eru bert galdandi fyri umróðurin.

**§ 39.** Reyð kort givin í umróðri á Ólavsøku skyldaður av, at bátar eru komnir javnt á mál, eru bert galdandi fyri umróðurin, og tapir báturin bert umróðurin.

**§ 40.** Høvuðsdómarin skal ansa eftir, at eingin óviðkomandi bátur uttanífrá kemur inn á kappróðrarøkið. Um óviðkomandi bátur órógvar róðurin, skal róðurin skjótast av, og rógvast skal umaftur frá upprunastarti.

**§ 41.** Fylgir bátur róðrinum, sum sigur frá tilgongdini, má hann ansa eftir ikki at koma inn á kappróðrarøkið. Um báturin órógvar róðurin, skal róðurin skjótast av, og rógvast skal umaftur frá upprunastarti.

**§ 42.** Um bátur brýtur árar, tollar ella slítur homlubond og annað, sum skal til fyri at rógva, og hetta ikki er orsakað av samanstoyti, skal kappróðurin halda fram og ikki tarnast av hesum.

*Stk. 2.* Um bátur verður fyri hesum óhappi og ikki ætlar at halda fram við róðrinum, skal manningin vera sitandi, so hetta ikki órógvar hinar manningarnar og dómaran.

[1] Strikað á aðalfundi 2023

*Stk. 3.* Órógvar báturin, skal róðurin skjótast av, og rógvast skal umaftur frá upprunastarti. Órógvandi báturin skal vera koyrdur úr kappingini.

**§ 43.** Bátur er á máli, tá ið kjósin fer um mállinjuna. Máldómarin ella hjálparin hjá máldómaranum skulu týðiliga rópa nummar ella navn á bátinum í tí, at kjósin fer um mállinjuna. Skrivarin hjá máldómaranum skal gera ein lista yvir, í hvørjum raði, bátarnir komu á mál. RSF sendir fjølmiðlunum røttu úrslitini av róðrinum.

**§ 44.** Enda bátar so javnir, at dómararnir kunnu ikki siga raðfylgjuna við vissu, fáa bátarnir sama stigatal. Stigatalið skal vera tað, sum tann fremsti av hesum bátum hevði fingið, um teir ikki vóru javnir. Samstundis detta burtur stigini, sum hesir bátar annars høvdu fingið.
*Stk. 2.* Um tveir ella fleiri bátar verða fremst og verða javnir í stigum eftir seinasta FM- róður, verður umróður sama dag um plássini í FM. Høvuðsdómararnir áseta tíðina, nær umróður skal vera. Teinurin, ið rógvin verður, er tann sami sum í uppruna róðrinum.

**§ 45.** Stigini í FM verða býtt soleiðis:
1. bátur nr. 1 fær 7 stig,
2. bátur nr. 2 fær 6 stig,
3. bátur nr. 3 fær 5 stig,
4. bátur nr. 4 fær 4 stig,
5. bátur nr. 5 fær 3 stig,
6. bátur nr. 6 fær 2 stig, og
7. bátur nr. 7 fær 1 stig.

**§ 46.** Róð verður í FM í 6 mannaførum masters kvinnur og 10 mannaførum masters á trimum stevnum, t.e. á ólavsøku og báðum teimum undanfarnu stevnunum.
*Stk. 2.* Stendur á jøvnum millum fleiri bátar, tá stevnurnar eru av, er tann vinnari, sum var best plaseraður seinasta FM-róður í kappingarárinum.
*Stk. 3.* Í barnaróðuri eru tað bert tey fimm bestu úrslitini í kappingarárinum, sum geva stig í FM- kappingini.

## Kapittul 8
## Aðrar reglur

**§ 47.** Víst verður til kunngerð nr. 66 frá 12. juni 2008 um bjargingarútgerð á kappróðrarbátum, sum er hjálagt sum fylgiskjal 1.

**§ 48.** Víst verður til Evstulóg hjá ÍSF, sum er hjálagt sum fylgiskjal 2.

**§ 49**. Hendan lóg kemur í gildi flaggdagin, tann 25. apríl 2021.

**Almennar viðmerkingar**

Víst verður til viðmerkingarnar til lóg fyri Róðrarsamband Føroya.

Høvuðsbroytingin við hesi lóg er, at kappingarreglunar í galdadi lógum fyri Róðrarsamband Føroya nú eru samlaðar í einari lóg.

Sambært § 10 í lóg um Róðrarsamband Føroya kunnu kappingarreglurnar verða broyttar av nevndini eftir, at tað er góðkent á aðalfundi, eykaaðalfundi ella við at ein meiriluti av teimum feløgum, sum møttu á seinasta aðalfundi, og sum fáa pening úr stevnugrunninum, skrivliga taka undir við broytingaruppskotinum.

Ætlanin er ikki, at nevndin í tíð og ótíð skal broyta kappingarreglurnar.

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Kunngerð nr. 66 frá 12. juni 2008 um bjargingarútgerð á kappróðrarbátum,
Fylgiskjal 2: Evstalóg hjá ÍSF